# Magni Laksafoss ger tað hann skal – men hvar finna vit ryggin, sum bera skal?

POUL MICHELSEN



Um mátin er so væl umhugsaður, skal eg ikki siga, men tað kennist sum eitt frískligt lot í politiska rúminum, nú valdeymurin er við at forpesta politisku luftina.

Men eg eri fullvísur í, at Magni veit, at talan ikki er um at ávísir flokkar – hvørki í samgongu ella andstøðu – sum eru fyri og ímóti tí, hann búskaparpolitiskt vil skal henda. Magni veit eisini, at mótstøðan hann fær minst líka nógv er at finna innanhýsis í hansara egna flokki.

Eg veit í hvussu so er, at fyri mær er onki nýtt í tí, sum ført verður fram, men eg eri púra samdur í, at ávaringarljósini, sum nú blinka bjart, skulu takast í fullum álvara.

Ein og hvør búskapur krevur røkt alla tíðina. Neyðug tiltøk skulu tryggja, at búskapargongdin verður so jøvn sum gjørligt. Hetta megnaði samgongan at gera, tá hon kikkstartaði búskapin fyri fýra árum síðan. Eins natúrligt er tað, at samgongan nú tekur ferðina av.

Vit eru flest øll samd um, at ongin búskaparkreppa er ávegis. Tað kennist undarligt, at vit í Føroyum onki málbari hava um vanliga búskaparrøkt. Vit hava bara tvey barometur – antin tosa vit um kreppu, tá tað gongst illa, ella um kreppu, tá ið tað gongst væl.

Stórt undirskot er á handilsjavnanum, og gjaldsjavnin er eisini negativur.

Vit vita, at arbeiðsorka er ikki í landinum at nøkta tað virksemi, sum tað privata og tað almenna longu hava. Tí er tað ikki rættur og ábyrgdarfullur fíggjarpolitikkur at økja virksemið enn meira nú.

Ein ávísur bati verður vónandi, nú landsstýrismaðurin í innlendismálum fer at gera tað lættari hjá útlendskari arbeiðsorku at røkka føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað kann kanska taka nakað av trýstinum í nøkrum vinnum, men ikki nóg mikið til at økja um samlaða virksemið.

Tað hevur verið mett skilagott, at tað almenna heldur aftur í íløgunum tá privata íløguvirksemið er stórt, og øvugt tá privata virksemið er lágt. Hetta fyri at javna og drýggja peningin, so sum mest fæst fyri hann. Hetta eigur enn at vera gott latín.

Fíggjarlógin hevur í hesum samgongutíðarskeiðnum verið hildin í einum sunnum afturhaldandi vøkstri. Men fíggjarlógin fyri 2007 vísti týðilig tekin um, at fasta takið var farið at vikna. Fíggjarlógin fyri 2007 vaks nevniliga dupult so nógv, sum hon hevði gjørt árini frammanundan.

Vit vóru nakrir fáir tingmenn, sum frá tingsins røðarapalli ávaraðu móti tí, sum hendi hendan myrka decemberdag 2006. Men vit vóru enn færri, tá rossahandlarnir vóru fingnir frá hondini.

Tá fíggjarætlanin fyri 2008 skal snikkast til, og allar ætlaninar eru komnar á borðið, er tað mín sannføring, at vit ikki sleppa undan at hava ávarðingarljósini í huga.

Loyvi mær at ivast í, um ryggur finnist til heystar í tinginum at gera tað, sum neyðugt er. Vit vita at fíggjarlógararbeiðið verður ein opin bardagi og at langtfrá øll fáa síni ynskir uppfylt. Mest sannlíkt er tí, at ongin fíggjarlóg kemur, men at vit semjast um eina provisoriska.

Spurningurin, sum løgmaður eigur at seta sær er, um vit ikki eiga at spara okkum fyri øllum hesum og útskriva val í heyst.

**Hvar bleiv minkingin av danska blokkinum av?**

Eg saknaði á fasitlistanum hjá Magna minking av blokkinum, sum eitt av búskapartiltøkunum at fremja.

Herfyri var Magni nevniliga í bløðunum og mælti til at lækka blokkin fyri at taka orku úr búskapinum.

Eg dugi ikki at síggja henda møguleika nevndan á fasitlistanum fyri búskaparligu inntrivunum.

Eg haldi, at Magni ger tað, sum hann eigur at gera sum landsstýrismaður. Nú er bara at finna ryggin í politisku skipanini, sum vil vera við til at halda búskapin á rættari kós. Magni skal ikki ivast í mær.

# Uppskot um at luta út partabrøv í Føroya Banka til Føroya fólk

**Uppskot til samtyktar um at luta út partabrøv í Føroya Banka til Føroya fólk**

JENIS AV RANA

løgtingsmaður



Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum evnar til og leggur fyri Løgtingið uppskot um, at luta út til alt Føroya fólk tann triðingin av Føroya Banka, sum enn er almenn ogn og undir ræði Fíggingargrunsins frá 1992. Hetta kann gerast á tann hátt, at hvør einstakur núlivandi føroyingur fær tillutað ognarbræv uppá sín part (áleið1/48000) av tí virði, henda ogn hevur í dag.

**Almennar viðmerkingar**

Við hesum uppskotinum til samtyktar tekur Løgtingið undir við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur fyri Løgtingið uppskot, ið hevur sum endamál at útluta til vanliga føroyingin tann triðingin av Føroya Banka, ið enn er almenn ogn.

Fíggingargrunnurin frá 1992 eigur í dag triðingin av partapeninginum í P/F Føroya Banka. Fíggingargrunnurin er skrásettur hjá myndugleikunum sum vinnurekandi grunnur og er í so máta uttan fyri ræðisrættin hjá politiska myndugleikanum, men tað serliga við Fíggingargrunninum frá 1992 er, at í serligari fólkatingslóg og í ríkislógartilmæli frá 1996 er ásett, at grunnurin kann luta út ogn til Føroya Landsstýri. Hetta er eisini ásett í viðtøkunum fyri grunnin, eins og tað er ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna sølu av partabrøvum í P/F Føroya Banka. Somuleiðis er ásett, at verður grunnurin tikin av, kann ognin fara í landskassan.

Tá virksemið hjá núverandi Føroya Banka byrjaði í byrjanini av 90-árunum, var prísurin øgiligur fyri hin einstaka føroyingin, ið varð álagdur at gjalda bjargingina av bankunum. Nøkur vórðu bundin á hond og fót restina av lívi teirra, onnur hóraðu ikki undan, men mistu hús og heim, og samanumtikið fekk henda bjargingartilgongd fatalar fylgjur fyri flestar føroyskar familjur.

Hetta offur, henda bjarging føroyinga av bankunum er grundleggjandi viðvirkandi til, at føroyski bankaheimurin, føroyska vinnulívið og føroyski búskapurin fótaðu sær, og at samfelagið á mongum økjum er væl fyri í dag. Hetta er burturav fremsta orsøk til ta framgongd, Føroya Banki hevur havt, og ta støðu, bankin hevur í samfelagnum í dag.

Hin 2. mei 2006 samtykti Løgtingið so gott sum einmælt at selja 2/3 av Føroya Banka. Í sær sjálvum var hetta ein løgin avgerð, tí Føroya Banki var væl fyri og gav eitt nøktandi fíggjarligt avkast til landskassan - felags inntøkukassa alra føroyinga. Men avgerðin varð tikin, og bankasølan byrjaði fyrr í summar.

Longu fáar dagar seinni varð greitt, at henda ognartøka var so illa skipað, at øllum ikki varð unt at ognast partabrøv. Nøkur, ið vóru fíggjarliga væl fyri, og onnur við serligum innliti til málið, fingu forrætt, meðan flestu vanligu føroyingar, tey, ið eisini vóru við at bjarga bankanum og samfelagnum, sótu eftir við sviðið soð.

Triðingurin av bankanum er tó enn samfelagsins ogn. Geva vit øllum føroyingum ognarbræv til prosentvísa part teirra av hesari ogn, tryggja vit honum rættvísa part hansara av ognini. Harvið veita vit honum og henni tøkkina, teimum tilkemur fyri bjargingarátakið í 1992.

*á Løgtingi, 26. juli 2007*

# Gløgt er gestsins eyga

NICOLINA JENSEN BEDER

Soleiðis var heitið á kronikkini 7. august í Vikubaðnum, har Óla Jákup Rólantsson greiddi frá samrøðu við enska exprofessarin Hamish L. Anderson. Ein sera áhugaverd samrøða.

Tað sum fangaði áhuga mín var Andersonsa viðmerking til leitingina eftir undirverkum í Føroyum. - Endurtikið úr samrøðuni. - H. L. A. Og so leita tit eftir undurverkum, sum um at júst tað, at tit liva so væl í friði so fjarskotin, ikki er størsta undrið í sjálvum sær. Tit hava misskilt nakað heilt álvarsliga. Eitt undur er á markinum til tað gudómliga, ella er tað. Grøðing er eitt undur, og at Jesus gjørdi vatn til vín er eitt undur. Men ein hálvgjørd gomul katólsk grótlaðing verður aldri eitt undur. Eitt útlendskt mentanarhús sum hetta verður aldri eitt undur. - Prátið gongur fyri seg í Norðurlandahúsinum. - Og so hugsar hann leingi og sigur: A wonder is a miracle, the feeling aroused by something marvellous, extremly and exeptionally beutiful, sigur hann heldur háfloygt og staðfestir, at okkurt av tí, føroyingar høvdu valt sum »undur« varð á ymsan hátt »bloody marvellous«, men so er alt sagt.

Spell at eg ikki fekk skift orð við henda áhugaverda mann, tá kundi eg havt víst honum eitt satt undurverk. Vanligi gongutúrur mín er gjøgnum Viðarlundina í Tórshavn. Í Viðarlundini er ein klovin klettur, og mitt úr klovningini veksur eitt træ. Hvørja ferð eg komi til klettin, rennur mær til hugs hin heimskenda sálmin: »Rock of Ages, cleft for meg. Let me hide myself in Thee«. Augustus M. Toplady (Ongl.), 1776. Í mínum ungu døgum sungu vit hann altíð á donskum. »Klippe, du som brast for mig, lad mig skjule mig i dig«. Umsett hevur Svend Regling. Á føroyskum eiga vit hann við tvinnanda týðingum. »Klettur klovin fyri mær, lat meg fáa lívd hjá tær«. Umsett hevur Jákup Dahl 1931. «Klettur klovin fyri meg! Fjaldur í tær eri eg«. Umsettur Victor Danielsen. Til at myndprýða henda sálm fæst valla vakrari mynd enn av steininum í Viðarlundini.

Sjálv havi eg hugsað, at yrkjarin kanska hevur sæð ein slíkan stein sum henda, men so er ikki. Frásøgn er um, at A. M. Toplady á høgari hædd í Burrington Combe kom í óvæntað toruveður og fann sær skýli í einum avkróki millum høgar kálksteinar. Har var sálmurin yrktur.

Tá ið ein gerst gamal, er gott at duga eitthvørt uttanat, tá er ein ongantíð heilt einsamallur. Nú ein dagin eg kom til steinin í Viðarlundini, rann byrjanarreglan á einum lovsangi fram fyri meg. »O, veldis Guð, eg undrandi má skoða«. Nic. J. Beder.